# Ein leikur um sjálvgóðsku

**30. mai spælir Kongaliga Danska Sjónleikarhúsið Ibsen leikin Lille Eyolf í Norðurlandahúsinum, Sosialurin var við, tá leikur varð frumsýndur í Starakassanum, ið er heitið á nýggjara pallinum á Kongaliga Danska Leikhúsinum í Keypmannahavn.**

SJÓNLEIKUR

*Orð:Niels Uni Dam, nielsuni@sosialurin.fo*
*Myndir: Per Morten Abrahamsen*

Ibsen leikurin Lille Eyolf kemur nú til Føroyar, leikurin er settur upp av leikstjóranum Jo Stormgren fyri Kongaliga Leikhúsið í Keypmannahavn. Lille Eyolf er ein leikur um ábyrgd, ella kanska rættari manglandi ábyrgd, og um kærleika, ið ikki veruliga røkkur útum tín egna persón, eitt innlit í sálina hjá menniskjum, ið eru fullkomiliga og inniliga upptikin av sær sjálvum.

### Høgt støði

Leikurin er ein av seinnu leikunum hjá Ibsen, og hevur av ymiskum orsøkum ikki verið settur upp so ofta sum flestu aðrir Ibsen leikir, kanska er tað kalda søgan um sjálvsalsk, ið hevur hildið fólki frá at nerta leikin. Í øllum førum er hetta fyrstu ferð, síðan leikurin hevði 16 sýningar í Kongaliga Danska Leikhúsinum í 1896, at hann er settur upp har.

Hetta er ein sterkur leikur, og í trá við støðið, ið tað Kongaliga Danska Sjónleikarhúsið vanliga borðreiðir við, er leikurin væl settur upp, við frálíkari pallmynd, góðum ljóðarbeiði og sjónleikarum av høgum støði.

### Vildi seta Lille Eyolf upp

Norska multitalentið, Jo Strømgren hevur, sum sagt, leikstjórna. Stromgren er klassiskt útbúgvin dansari, væl umtóktur koreografur og nógv umbiðin leikstjóri, so mikið nógv umbiðin, at hann sjálvur velur og vrakar, hvat hann tekst við, og Lille Eyolf vildi hann leikstjórna.

### Rennur undan ábyrgd

Leikurin er um hjúnini Ritu og Alfred og teirra kryplaða son Eyolf. Alfred hevur gift seg við Ritu, tí at hon er rík, soleiðis, at hann fekk pening at taka sær av lítlu systir síni Astu, ið hann hevur eitt sterkt kærleikssamband við, ið tykist siðamisbrotskent.

Saman við Ritu eigur Alfred sonin lítla Eyolf, ið er krypil, eftir at hann sum nýføðingur datt av skiftiborðinum, meðan foreldrini hugnaðu sær í eini heitari løtu. Henda hending hevur merkt alt samlívið millum Ritu og Alfred, og serliga Alfred tykist at hava torført við at liva við skuldarkensluni, ið tí verður skúgva til viks. Ístaðin hevur hann í áravís, brúkt alla sína orku til arbeiðið við eini ritgerð um ábyrgd - Alt meðan hann sjálvur rennur undan allari ábyrgd.

### Absurd forhold

Í leikritinum er Eyolf lamin í eina beininum, men Stormgren hevur krypla hann somikið illa, at hann í hesi uppsetingini er eitt ilttelt, ið koyrir runt í einum elektriskum rullistóli, øll tala hja Eyolfi er skriva úr leikinum, og ístaðin hoyrir tú bert hása andadráttin úr iltteltinum. Hetta riggar væl inn í leikin og gevur, teimum absurdu forholdunum millum Ritu, Alfred, Eyolf og Astu ein enn meira absurdan dám. Rita vil eiga Alfred, vil ikki deila hann við nakran, enn ikki Eyolf, men hetta er ikki kærleiki, men heldur ein svøk ognarkensla, tí Rita elskar bert seg sjálvan. Alfred harafturímóti elskar Astu næstan líka nógv, sum hann elskar seg sjálvan.


*Pallmyndin var meistarliga gjørd, og skapti júst tann rætta andan á pallinum*

### Sálarligir kryplar

Leikurin gongur fyri seg hálvt annað døgn í lívinum hjá hesi sálarliga vanskeplaðu familju. Alfred hevur á einum túri í fjøllunum funnið út av, at ístaðin fyri ritgerðina um ábyrgd, skal hann ogna lítla Eyolfi alla sína tíð. Hetta fær øði í Ritu, ið ikki vil deilast við Eyolf um Alfred, hon ynskir, at Eyolf ikki var, og knappliga er hann ikki longur, Lítli Eyolf koyrir á sjógv í sínum elektriska rullistóli og druknar.

Hetta gerst hendingin, ið koppar øllum á. Tey bæði sjálvgóðu foreldrini verða noydd at hyggja inn í seg sjálvan, noyðast at endurumhugsa sítt lív og sítt samlív. Burtur úr hesum kemur góður og sterkur sjónleikur.

### Væl spældur leikur

Bæði Alfred og Rita er væl spæld. Serliga er Benedikte Hansen í leiklutinum sum Rita sannførandi. Hendan kyniska veran, ið bert elskar seg sjálva og bert hugsar um seg sjálva, fær lív í hondunum á Benedikte. Peter Gilsfort spælir eisini sannførandi, tann eitt sindur distreti og djúpt forstýraði Alfred.

Leikluturin sum Asta var í frumsýningini spældur av Helle Fagralíð. Hon var ikki heilt sannførandi og gjørdi ikki heildarupplivingina betur. Helle Fagralíð verður tó ivaleyst ikki við í Føroyum, av tí at hon er somikið nógv við barn, og hetta sæðst ov týðiliga til, at hon kann spæla leiklutin sannførandi. Í staðin spælir Laura Bro leiklutin sum Asta. Teir báðir hjáleiklutirnir vóru sera væl spældir, Rasmus Botoft, sum tann heldur nørdkendi verkfrøðingurin og Helle Hertz, sum tann ræðandi rottu moyggin, vóru bæði sera góð. Hertz gjørdi rottu moyggina júst so vemmiliga, sum hon eigur at vera. Meðan Botoft gevur leikinum eitt sindur av menniskjaligheit.


*Benedikte Hansen gevir leiklutinum sum Rita lív.*

### Myrkara síðan av mannasálini

Samanumtikið er talan um ein sterkan leik, um myrkaru síðirnar av mannasálunum. Ein leikur, ið verður sitandi í kroppinum leingi eftir at leiktjaldið er drigið fyri. Hetta er ein leikur, ið tekniskt fungerar á høgum støði. Hetta er ein forkunnugur møguleiki, hjá føroyingum at uppliva Kongaliga Danska Leikhúsið, uttan at skula fara av landinum.

---

# Tunnilsfundur í Sandoynnni

**Samljóð í Skopun verður fríggjadagin 19.05.06 karmur um søguligan og forvitnisligan fund. Tá seta sandoyingar undirsjóvartunnil til Sandoynna á breddan og serkønir á økinum halda fyrilestrar og tosað verður um fyrimunir og vansar við slíkum tunnli**

UNDIRSJÓVARTUNNIL

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Samljóð í Skopun verður fríggjadagin klokkan 19.00 karmur um søguligan og forvitnisligan fund.

Í samband við at arbeitt verður, við at fáa undursjóartunnil til Sandoynna, hevur ein fyribils tunnilsnevnd, sum er skipað av teimum politisku vælfeløgunum í Sandoyar sýðslu, tikið stig til ein kunnandi fund í Samljóð i Skopun.

Nevndin hevur kunnað Suðuroyar Vinnuráð, og aðrar persónar har, um tað sum arbeitt hevur verið við og fingið teir við í málið. Nevndin hevur møtt stórari vælvild frá teimum í Suðuroynni, sum vit hava verði í samband við og stór semja er millum báðar oyggjarnar, at saman standa vit sterkari, verður sagt í tíðindaskrivi frá fyrireikandi nevndini.

– Í Sandoynni er onki vinnufelag og eingin felagskommuna, sum til dømis í Vágunum. Tí hava tey politisku vælfeløgini tikið stig til hetta, og halda vit at hetta hevur verið eitt fruktargott samstarv. Kommunurnar í Sandoynni eru kunnaðar um fundin. Og tær eru positivar og vilja uttan himpr stuðla okkum í hesum arbeiði, sigur nevndin, ið eisini hevur sett upp skrá fyri fundin.

**Fyrimunir við undursjóartunnli:**

• Fáa betri samband fyri vinnulívi, fiskaflutning, pendlarar, næmingar og onnur.

• Ferðavinnan verður styrkt munandi.

• Suðuroyingar hava møguleika til at fáa nógv fleiri túrar við eini Suðurleið.

• Betri møguleikar at flyta orku, her verður hugsað um háspenningskápul ígjøgnum tunnilin.

• Møguleika til alternativa orku so sum alduorka, vindmyllur.

• Møguleikar við avlopsgróti.

**Vansar um tunnil ikki kemur:**

• Suðuroy og Sandoy koma við tíðini at verða eftirbátar og koma sum frálíður at armast út sum samfeløg.

**Við á fundinum sum fyrilestrahaldarar verða:**

• Dávur Reinert Hansen
• Svein Kristiansen
• Oyvindur Brimnes

**Fyriskiparar eru tey politisku vælfeløgini í Sandoynni:**

Folkaflokkurin, Javnaðarflokkurin, Tjóðveldisflokkurin, Sambandsflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin.

Kontaktpersónar fyri fyriskipararnar eru Ingimar Thomsen ogWiljam Sand Davidsen.